LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fuglafjarðar kommuna
Í Støð 5
FO-530 Fuglafjørður

Tórshavn, tann: 29. august 2025
J. nr.: 25/03250
Viðgjørt: JMJ

**Viðvíkjandi handfaring av keypi av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn**

A, býráðslimur, hevur tann 30. januar 2025 heitt á Kommunala eftirlitið í Løgmálaráðnum um at taka mál upp við Fuglafjarðar kommunu um keyp av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn.

Kommunala eftirlitið er nú liðugt við at viðgera hetta málið.

**Niðurstøða**

Keypið av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn, uttan tøka játtan, var ikki í samsvari við §§ 40 og 41, stk. 1 í kommunustýrislógini, umframt §§ 12, 14 og 26 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu. Eftirfylgjandi býráðsviðgerðin fyri afturlatnum hurðum, tann 30. januar 2025, var ikki í samsvari við § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, stk. 2 í fundarskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.

**Avgerðargrundarlag**

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023.
- Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu, dagfest 31. januar 2025.
- Fundarskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu, dagfest 1. oktober 2001.

**Um málið**

Eitt starvsfólk hjá Fuglafjarðar kommunu hevði tann 8. januar 2025 keypt ein nýggjan arbeiðsbil til Fuglafjarðar havn uttan at Fuglafjarðar býráð hevði samtykt at játta fígging til keypið. Tá kommunan gjørdist varug við keypið, fór hon beinanvegin undir tilgongdina at játta neyðuga peningin. Á býráðsfundi tann 30. januar 2025 varð málið um keyp av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn viðgjørt fyri afturlatnum hurðum.

**Málsgongd**

Kommunala eftirlitið hevur fingið eina áheitan frá A, býráðslimi í Fuglafjarðar kommunu, um eitt mál viðvíkjandi keypi av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn. Í áheitanini førdi A fram, at málið var sera illa lýst, og at ein fakturi upp á arbeiðsbilin var dagfestur 8. januar 2025, hóast málið í kommununi ikki varð viðgjørt í fíggjarnevndini fyrr enn tann 23. januar 2025, í vinnu- og havnanevndini tann 29. januar 2025 og samtykt á býráðsfundi tann 30. januar 2025. Harumframt setti A spurnartekn við, um tað var rætt, at málið um bilin varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum á býráðsfundinum tann 30. januar 2025.

Tann 17. februar 2025 sendi Kommunala eftirlitið soljóðandi skriv til Fuglafjarðar kommunu:

> "Kommunala eftirlitið í Løgmálaráðnum hevur tann 4. februar 2025 fingið klagu frá A, býráðslimi, sum, vegna nakrar býráðslimir í Fuglafjarðar býráð, klagar um viðgerðina av málinum um at keypa nýggjan bil til Fuglafjarðar Havn. Klagan er viðfest hesum telduposti.
>
> Í klaguni verður ført fram, at málið var sera illa lýst, og at bilurin varð keyptur, áðrenn hetta varð samtykt á býráðsfundi. Eisini verður upplýst, at býráðsviðgerðin av málinum var fyri afturlatnum hurðum.
>
> Fyri at Kommunuala eftirlitið kann taka støðu til, um hetta er eitt mál, sum Kommunala eftirlitið tekur upp við Fuglafjarðar býráð, verður Fuglafjarðar kommuna biðin um at lata Kommunala eftirlitinum eina frágreiðing um málið og øll skjøl í málinum."

Tann 6. mars 2025 sendi Fuglafjarðar kommuna Kommunala eftirlitinum skjølini í málinum og soljóðandi frágreiðing:

> "**Lýsing av gongdini í málinum**
> Fuglafjarðar havn hevur arbeiðs bil, sum teir nýta til virksemið á havnalagnum og tá farið verður at loðsa á Eiði og Sundalagnum.
>
> Umleið 10. desember 2024 eru Havnastjórin, borgarstjórin og onnur úr umsitingini í køkinum á kommunuskrivstovuni har prátið millum annað kemur inn á pick-up bilin hjá havnini. Havnastjórin upplýsir at bilurin, sum er 16 ára gamal er í sera vánaligum standi og at tað kostar ímóti 100 tkr. at gera hann í stand. Umrøtt varð at hetta er nógvur peningur og borgarstjórin bað Havnastjóran kannað hvat ein nýggjur bilur kostar.
>
> Umleið 13. Desember 2024, sigur havnastjórin borgarstjóranum frá at passandi hevði verið við einum líknandi bili, sum tann eini vegadeildin nýtir. Borgarstjórin bað havnastjóran kannað prísin á einum tílíkum bili og vísti honum eina mynd av bili Føroya bilsøla kundi skaffa.
>
> Fyrst í januar 2025 eru borgarstjórin, tekniski leiðarin og havnastjórin á skrivstovuni hjá tekniska leiðaranum har havnastjórin boðar frá hann hevur funnið rætta bilin. Borgarstjórin boðar havnastjórin frá at keypið skal leggjast fyri Vinnu- og havnanevndina og býráðið, tí peningur ikki er oyramerktur til hetta keypið í fíggjarætlanini.
>
> Um miðjan januar 2025 verður borgarstjórin varugur við ein faktura í Navision skipanini, sum er uppá ein bil til havnina. Borgarstjórin spyr kommunustjóran um hann veit nakað um hetta keypið, men hesin svarar noktandi. Kommunustjórin kontaktar beinanvegin havnastjóran, sum játtar at hava bílagt bilin, tí hann helt at grønt ljós var givið fyri hesum.

Sama dag heitir kommunustjórin á tekniska leiðara um at fyrireika málið um keypið fyri fyrst komandi fíggjarnevndarfund, sum varð hildin 23. januar 2025.

Á fíggjarnevndarfundinum verður munnliga ført fram at málið orsakað av misskiljingum millum "*borgarstjóran og havnastjóran, ikki hevur" (okkara viðmerking)* fylt teimum mannagongdunum í kommunustýrisskipanini hjá Fuglafjarðar kommunu, sum eru fyri keyp av tílíkum slag har tað fyrst eigur at viðgerast í Vinnu- og havnanevndini og eftirfylgjandi í Fíggjarnevndini áðrenn tað verður lagt fyri býráðið. Á fundinum kravdi B málið fyri býráðið, tí hann ikki metti rætt vera borið at í málinum.

Sama dag heitti kommunustjórin á tekniska leiðaran um at upplýsa málið betur og kom svarið sama dag(sí avrit av teldupostasamskifti).

29. januar 2025 varð málið fyri í Vinnu- og havnanevndini har nevndin millum annað staðfestir, at tað ikki er farið rætt fram og heitir á umsitingina um at gjøgnumganga mannagongdirnar fyri leiðarunum á tekniska økinum, so hesar verða hildnar framyvir. D nevndarlimur vísir á manglandi skjalfestar kravfestingar fyri bilin. Meirilutin í nevndini E og F, taka undir við at bilurin verður keyptur.

Síðani varð málið viðgjørt á býráðsfundi 30. januar 2025, fyri afturlatnum hurðum har meirilutin býráðslimirnir G, H, E, F og J atkvøddu fyri meðan A, D, K og B atkvøddu ímóti. Uppskotið var soleiðis samtykt.

**Viðmerkingar til málið og klaguna**
Spurningur er ikki settur við hvørt Fuglafjarðar havn hevur tørv á nýggjum bili, men um tilgongdina og viðgerðina av málinum.

Tilgongdin í málinum hevur ikki verið í tráð við kommunustýrisskipanina hjá Fuglafjarðar kommunu og byggir hetta á eina misskiljing millum Havnastjóran og umsitingina hjá Fuglafjarðar kommunu.

Hinvegin varð handlað beinanvegin misskiljingin kom í ljósmála og arbeitt varð við, at fáa málið á beint aftur.

Viðvíkjandi avgerðini hjá borgarstjóranum um, at viðgera málið fyri afturlatnum hurðum, so metti borgarstjórin málið verða av tílíkum slag, at stórur vági varð fyri, at viðgerðin kom, at meta um persónlig viðurskifti hjá starvsfólki/um í Fuglafjarðar kommunu(sí §1, 2. petti. 1. Punkt í fundarskipan fyri Fuglafjarðar býrað)."

## Viðmerkingar hjá Løgmálaráðnum

*Keypið framt uttan býráðssamtykt*

Fuglafjarðar kommuna hevur í januar 2025 keypt ein bil til Fuglafjarðar havn, uttan at peningur var játtaður til keypið. Í frágreiðingini frá kommununi stendur, at hetta skyldast eina misskiljing millum havnastjóran og umsitingina í Fuglafjarðar kommunu. Í teldupostsamskifti millum kommunustjóran og tekniska leiðaran, greiðir tekniski leiðarin soleiðis frá:

"(...) Av tí at 1mió bleiv flutt yvirum ár, og tann íløgan ikki var oyramerkt, so helt M at bilurin kundi fara av hesari íløguni, av tí at hann hevði tosað bæði við borgarstjóran og síðani tekniska leiðaran.

Havnastjórin hevur verið í fleiri bilasølum og hugt eftir bilum. Leveringstíðirnar lógu allar á uml. 1,5 upp til 2,5 ár. Síðani fekk hann ein prís frá Føroya bilasølu, sum kundi levera bilin innan 4 vikur, men so skuldi hann bíleggja hann beinanvegin, av tí fleiri vóru um boðið. Hann hevur í góðari trúgv bílagt bilin eftir at hann hevur tosað við borgarstjóran og tekniska leiðaran um nýggjan bil."

§ 40 í kommunustýrislógini ásetir tann játtanarliga- og fíggjarliga týdningin av einari samtyktari fíggjarætlan. Í viðmerkingunum til § 40 í kommunustýrislógini stendur:

"Fíggjarætlanin inniheldur tær játtanir, ið kommunustýrið hevur samtykt fyri komandi fíggjarárið og er bindandi fyri kommunalu fyrisitingina. Hetta lýsir aðalregluna um, at eingin útreiðsla má haldast, fyrr enn neyðug játtan er fingin til vega."

Í skjølunum í málinum sæst, at í tilmælinum til málið til býráðsfundin 30. januar 2025 stendur:

"Soleiðis, sum málið er lýst hevði møguleiki verið at nýtt §21. Stk. 3 í kommunustýrislógini "Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva." Tá hendan greinin ikki er nýtt mælir kommunustjórin til, at býráðið tekur undir við bilkeypinum til havnina."

Kommunala eftirlitið skal í hesum sambandi vísa til viðmerkingarnar til § 41, stk. 1 í kommunustýrislógini, sum ásetur, at ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk. Í viðmerkingunum stendur:

"Harumframt tekur stk. 1 sum givið, at bann er ímóti, at heimila øðrum játtanarheimild. Sostatt skulu allar málsviðgerðir um játtanarveitingar verða viðgjørdar í kommunustýrinum. Hetta forboð hevur millum annað við sær, at borgarstjórin ikki sjálvur kann veita játtanir, sjálvt um talan er um mál, sum ikki tola at bíða ella har eingin orsøk er til iva, samanber § 21, stk. 3. Kommunustýrið er sostatt einaráðandi á játtanarøkinum í kommunalum viðurskiftum."

Sostatt kann borgarstjórin ikki taka avgerð í málum sum ikki tola at bíða, ella har eingin orsøk er til iva, sbrt. § 21, stk. 3 í kommunustýrislógini, tá talan er um mál um játtanarveitingar, sbrt. viðmerkingunum til § 41, stk. 1. Harumframt er ásett í §§ 12, 14 og 26 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, hvørjar mannagongdirnar hjá kommununi eru í sambandi við játtanarveitingar og fíggjarligu umsitingina.

Í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu er soleiðis ásett:

**§ 12**

"Nevndirnar ansa eftir, at ikki verður brúktur meira peningur enn avsettur er sambært teim einstøku upphæddunum á ársfíggjarætlanini ella er játtaður við eykajáttan. Um tað er hildið ynskjandi ella neyðugt at játta meira pening, senda nevndirnar – um fíggjarnevndina – býráðnum tilráðing hesum viðvíkjandi.

Sambært § 31, stk. 1 í kommunustýrislógini ansar nevndarformaður eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktunum, somuleiðis sum hann eisini ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan"

**§ 14, stk. 4**
**Fíggjarnevndin**

"Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu – áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar – hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini"

**§ 26, stk. 2**
**Vinnu- og havnanevndin**

"Nevndin fyrisitur havnir eins og smábátahavnir og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi. Sama er galdandi fyri kommunalar bygningar og annan útbúnað og ognir, ið hoyra havnunum til. Nevndin umsitur saman við fíggjarnevndinii peningaviðurskifti og roknaskaparhaldið hjá havnunum, hetta samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø."

Í frágreiðingini frá Fuglafjarðar kommunu skrivar kommunan soleiðis:

> "Tilgongdin í málinum hevur ikki verið í tráð við kommunustýrisskipanina hjá Fuglafjarðar kommunu og byggir hetta á eina misskiljing millum Havnastjóran og umsitingina hjá Fuglafjarðar kommunu."

Kommunala eftirlitið kann staðfesta, at keypið av nýggjum bili til Fuglafjarðar havn, ikki er farið fram í samsvari við §§ 40 og 41, stk. 1 í kommunustýrislógini og heldur ikki í samsvari við §§ 12, 14 og 26 í kommunustyrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu. Av tí at Fuglafjarðar kommuna longu hevur ásannað hetta, hevur Kommunala eftirlitið ikki fleiri viðmerkingar til hetta.

*Viðgerð fyri afturlatnum hurðum*

Í áheitan síni setur A spurnartekn við, hvørt tað var rætt, at býráðsfundurin 30. januar 2025 varð hildin fyri afturlatnum hurðum.

Sambært § 26, stk. 1, 1. pkt. í kommunustýrislógini er meginreglan, at kommunustýrisfundir skulu verða almennir. Endamálið handan § 26, stk. 1, 1. pkt. er at tryggja fólkaræðiliga eftirlitið við avgerðunum hjá kommunustýrinum. Hetta eftirlitið er treytað av, at viðurskifti av almennum áhuga kunnu lýsast og viðgerast í tí almenna kjakinum. Somuleiðis kann fundaralmenni verða við til at stimbra um álitið hjá almenninginum til kommunustýrið, og harvið forða fyri órøttum fatanum um virksemið hjá kommunustýrinum.

Tó kann kommunustýrið, sambært § 26, stk. 1, 2. pkt gera av, at mál skulu viðgerast fyri afturlatnum hurðum, um tað er neyðugt, eitt nú um talan er um persónsmál. Sambært viðmerkingunum til § 26, stk. 1, 2. pkt. í kommunustýrislógini er ásetingin eitt undantak til lógarásettu meginreglu um, at kommunustýrisfundir eru almennir. Í viðmerkingunum stendur:

> "Tey mál, ið av góðum grundum kunnu verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum, eru tílík, har trúnaðarupplýsingar væntandi verða drignir fram undir málsviðgerðini. Men um trúnaðarlig upplýsing bert kann væntast at verða drigin fram í møguligum kjaki í einum máli, sum er á fundarskránni, skuldu ongar áneyðir verið at havt fund fyri afturlatnum hurðum."

Sostatt er eitt krav um, at trúnaðarligar upplýsingar ítøkiliga verða drignar fram undir málsviðgerðini. Tískil er ein vanlig væntan um, at trúnaðarligar upplýsingar verða umrøddar í málsviðgerðini, ikki eitt nøktandi grundarlag fyri, at viðgerðin av einum máli á kommunustýrisfundi skal verða fyri afturlatnum hurðum. Um tað undir viðgerðini ítøkiliga vísir seg, at tað er neyðugt at draga upplýsingar fram, sum krevja viðgerð fyri afturlatnum hurðum, kann býráðið tá viðgera restina av málinum fyri afturlatnum hurðum.

Endamálið við at viðgera mál fyri afturlatnum hurðum er, at taka fyrilit til privatlív, loyniligar vinnu- og handilsupplýsingar, tagnarskyldu ella ein serstakan almennan áhuga. Í mun til fundaralmenni eru tað upplýsingar sum eru fevndar av tagnarskyldu sambært § 26 í fyrisitingarlógini, sum eru at meta sum trúnaðarligir upplýsingar.

Í fundarskipan síni kunnu kommunurnar áseta sløg av málum, har meginreglan er, at málini skulu viðgerast fyri afturlatnum hurðum, tó at kommunan framvegis í hvørjum einstaka føri skal gera eina ítøkiliga meting. Í fundarskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu er soleiðis ásett í § 1, stk. 2:

> "Uttan so at býráðið í serstøkum føri tekur aðra avgerð, skulu niðanfyri tilskilaðu mál verða viðgjørd fyri afturlatnum hurðum:
>
> 1. Mál, har mett skal verða um persónlig viðurskifti.
> 2. Mál um keyp og sølu av føstum ognum og veðseting.
> 3. Kostnaðarætlanir og tilboð viðvíkjandi byggiarbeiðum og tilfarsveitingum."

Sambært frágreiðingini frá kommununi, hevði borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu gjørt av, at málið skuldi viðgerast fyri afturlatnum hurðum sbrt. § 1, stk. 2, 1. pkt. í Fuglafjarðar fundarskipan, tí hann metti, at stórur vági var fyri at viðgerðin kom at meta um persónlig viðurskifti hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu.

Í frágreiðingini og skjølunum, sum Kommunala eftirlitið hevur móttikið frá kommununi, dugir Kommunala eftirlitið ikki at síggja, at nøkur trúnaðarlig viðurskifti vóru, sum kundu grundgeva fyri, at málið átti at verið viðgjørt fyri afturlatnum hurðum á býráðsfundinum hjá kommununi tann 30. januar 2025. Tær umstøður, at eitt starvsfólk hjá kommununi verður umrøtt undir viðgerðini í býráðnum, er ikki ein nøktandi grundgeving fyri, at eitt mál verður viðgjørt fyri afturlatnum hurðum. Metingin hjá borgarstjóranum um, at tað var stórur vági fyri, at trúnaðarlig viðurskifti møguliga fóru at verða viðgjørd í málinum, var ikki so mikið ítøkilig, at hetta var eitt nøktandi grundarlag fyri at viðgera málið fyri afturlatnum hurðum, sbrt. omanfyristandandi.

Kommunala eftirlitið heldur tí, at málið um keyp av nýggjum bili til Fuglafjarðar havn, ikki átti at verið hildið fyri afturlatnum hurðum á býráðsfundinum tann 30. januar 2025.

**Niðurstøða**

Vísandi til gjøgnumgongdina omanfyri, heldur Kommunala eftirlitið ikki, at keypið av arbeiðsbilinum til Fuglafjarðar havn, uttan tøka játtan, var í samsvari við §§ 40 og 41, stk. 1 í

kommunustýrislógini, umframt §§ 12, 14 og 26 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu. Eftirfylgjandi býráðsviðgerðin fyri afturlatnum hurðum, tann 30. januar 2025, var ikki í samsvari við § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, stk. 2 í fundarskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu..

Sambært frágreiðingini hjá kommununi varð keypið av bilinum uttan heimilaða fígging framt vegna eina misskiljing í kommununi. Vinnu- og havnanevndin í Fuglafjarðar kommunu hevur staðfest, at málið ikki er farið rætt fram, og hevur heitt á umsitingina um at gjøgnumganga mannagongdirnar fyri leiðarar á tekniska økinum, so hesar verða hildnar framyvir. Kommunala eftirlitið hevur tí ikki fleiri viðmerkingar til hetta.

Viðvíkjandi býráðsfundinum um keypið av bilinum, sum varð hildin fyri afturlatnum hurðum, fer Kommunala eftirlitið at heita á Fuglafjarðar kommunu um framyvir at gera neyvari metingar um, hvørji mál kunnu viðgerast fyri afturlatnum hurðum, og nær áneyðir eru fyri tí.

Av tí at málið um keyp av arbeiðsbili til Fuglafjarðar havn er framt í verki, ger Kommunala eftirlitið ikki meira við hetta málið.

Løgmálaráðið, 29. august 2025

Nella Festirstein

Aðalstjóri